# Fleiri menn og færri kvinnur steriliserast

Í frágreiðingini frá landslæknanum sæst, at javnvágin nærkast ímillum kynini, hvat viðvíkur sterilisatiónum.

Tað tykist sum at alt fleiri menn og alt færri kvinnur søkja um sterilisation. Frágreiðingin frá landslæknanum vísir nevniliga tølini yvir umsóknir um sterilisatiónir, sum hava fingið játtandi svar.

Tað sæst á øllum brøgdum, at stór broyting er komin í sterilisatiónsvanarnar. Frá 1994 til 2003 eru tølini fyri kvinnuligar og mannligar umsøkjarar, ið fáa játtan til sterilisatión, ávíkavist minkað og vaksin.

Í 1994 var munurin sera stórur, við bert 8 mannligum játtanum og heili 59 kvinnuligum.

Í 2003 vóru tølini tó broytt til, at 21 menn og 39 kvinnur fingu ja, tá tey søktu.

Í 1994 vóru tað sostatt heili 51 fleiri kvinnur enn menn sum søktu, meðan talið í 2003 er útjavnað til bert at vera 18 fleiri kvinnur.

### Hini norðurlondini

Føroyar eru tó ikki nakað eindømi við hesi broyting í tølunum, tí gongdin í hinum norðurlondunum tykist vera tann sama. Bæði í Danmark, Finlandi, Íslandi, Noregi og Svøríki eru tølini stútt vaksandi fyri menn, meðan tey fyri kvinnur eru alsamt minkandi.

Einastu undantøkini eru Grønland og Áland, har tølini fyri bæði kynini eru vaksandi, vísir ársfrágreiðingin hjá landslæknanum.

Hví gongdin er broytt so munandi, er ilt at gita um.

**eys**

# Chlamydia ger um seg í Føroyum

Sambært frágreiðingini frá landslæknanum, ger kynssjúkan Chlamydia veruliga um seg í Føroyum. Í 2003 vóru heili 87 av Chlamydiaroyndunum, ið tiknar vórðu, positivar.

Í tølunum ber eisini til at lesa, at talið av Chlamydiasjúklingum, stútt er vaksið síðan 1994. Um tú, fram til 2001, vart kannaður fyri Chlamydiu, varð hetta gjørt við eini analysu skipan, nevnd ELISA. Henda skipan var ikki heilt neyv, og tí varð í 2001 ein nýggjur analysuháttur tikin í nýtslu, har DNA teknikkur verður nýttur. Hetta er ein munandi neyvari kanningarháttur, ið "fangar" fleiri Chlamydiasjúklingar, enn gamla skipanin.

Hetta sæst eisini aftur í tølunum, sum vuksu markant í 2001. Síðani 2001 hava tølini tó bara hildið á at vaksið støðugt, og er hetta ein ábending um, at føroyingar ikki eru nóg ansnir, tá tað kemur til kynslívið.

Chlamydia smittar við kynsligum sambandi, men kann fyribyrgjast við hít.

Eingin tilburður av hinum stóru kynssjúkunum, gonnoré, syfilis ella AIDS, var staðfestur í 2003.

# Klagur

Í 2003 komu inn 12 klagur um fakliga virksemi hjá autoriseraðum persónum innan heilsuverkið. Hetta er methøgt tal. Klagurnar eru allar sendar víðari til viðgerðar í Sjúklingaklagunevndini.



*Hvussu kunnu Guttesen & Staksberg hava havt eitt góðkent byggiloyvi síðani 1989, tá býráðið sjálvt so seint sum í febr./mars 2003 bert hevði eina fyribils ætlan?*

Mynd: Jens Kristian Vang

# Okkurt er galið í býráðnum

**Tey eru fleiri, sum hava verið niðri á býráðnum og biðið um at fingið tekningarnar yvir økið, har nú verður bygt á Maritugøtu. Tey hava øll fingið at vita, at hetta bert hava verið fyribils tekningar, og tí hava tey ikki hongt seg so nógv í hesar ætlaninar. Men nú eru fyribils tekningarnar vorðnar veruleiki. Tey í Torkilsgøtu standa spyrjandi og undrast á nær og av hvørjum, hesar ætlaninar eru blivnar góðkendar**

BYGGILOYVI
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Ein av íbúgvunum í nógv umtalaðu Torkilsgøtu, undrast stórliga á tað, sum Eyðfinn Guttesen frá Guttesen og Staksberg segði við Sosialin í gjár, um at endaligu byggiætlaninar hava ligið niðri á býráðnum síðani 1989. Hann sigur, at tey eru fleiri at íbúgvunum í Torkilsgøtu, sum hava verið niðri á býráðnum og spurt seg fyri um økið niðanfyri húsini.

– Í mei í fjør var eg sjálvur niðri á býráðnum. Har fekk eg eina tekning yvir økið. Á hana var prentað, at hetta bert var ein fyribils ætlan. Tað slógu vit okkum so til tols við, tí um tað ikki var endaliga ætlanin, so var sum so einki at klaga um. Hetta var jú ikki fastlagt, men var bert ein fyribils ætlan. Vóru tekningarnar endaliga góðkendar, so kundu vit mótmælt, tí so var tað ítøkiligt, sigur ein argur húsaeigari í Torkilsgøtu, sum tó helst ikki vil hava navn sítt á prent.

Hann sigur, at síðani hann var á býráðnum, hava fleiri av grannum hansara eisini verið; tann seinasti var í februar/mars í ár. Øll hava tó fingið sama svarið, at hetta bert er ein fyribils ætlan, og at einki ítøkiligt er avgjørt enn. Eingin hevur sæð ein góðkendan plan yvir økið, og tí undrast tey í Torkilsgøtu stórliga á hvussu tað kann bera til, at Guttesen og Staksberg siga seg hava havt eina góðkenda ætlan síðani 1989.

– Tað tykist ógvuliga undarligt, at byggifelagið hevur havt eina góðkenda ætlan, tá býráðið sjálvt ikki hevur havt tað. Har er okkurt sum ikki stemmar, og sum má vera dottið burturímillum. Tí hetta ber ikki til, heldur hann. Hann sigur seg vera ógvuliga skuffaðan av fyrisitingini á býráðnum, og heldur, at hetta málið er púra burturvið.

–– Tað sum eg fegin hevði viljað vitað, er akkurát nær hendan ætlanin er farin frá bert at vera ein fyribils ætlan og til at vera ein góðkend ætlan. Tí eg skilji hetta heilt einfalt ikki. Tað, sum teir siga um, at hetta hevur verið góðkent síðani 1989 kann heilt einfalt ikki stemma, táið býráðið so seint sum í februar ella mars í ár, bert hevði eina fyribilsætlan at vísa fram. Hetta má vera eitt tekin um, at okkurt er galið í býráðnum, heldur hann.

### Mismunur

Hann sigur víðari, at hann, tá hann sá húsatekningarnar hjá Høgna Mikkelsen fyri Torkilsgøtu, bað hann Høgna um at gera húsini bara einar 20 cm hægri, so tey kundu fáa fulla úrtøku úr loftinum. Svarið var, at tað varð noktað av býráðnum, tí so kundu raðhúsini í Torkilsgøtu taka útsýni hjá teimum í Jørundargøtu omanfyri. Og tað var so í lagið.

– Men tað er ikki í lagið nú, táið teir byggja hesar stóru klossarnar beint uppfyri okkara vindeygu. Tað eru knøpp trý ár síðani, at vit ikki kundu byggja eftir ætlanunum, fyri ikki at taka útsýni frá teimum omanfyri. Hetta er heilt ótrúliga skuffandi, og so serliga tá tað er so ivasamt við hasum byggitekningunum, sum okkum vitandi slett ikki eru góðkendar, men bert eru ein fyribils ætlan, sigur hann at enda.

# Býráðið framvegis onga viðmerking

Heðin Mortensen, sum er formaður í býar- og bygginevnsini hjá Býráðnum, vil ikki gera nakra viðmerking til byggimálið í Hoyvíkshaganum enn.

– Eg fekk mótmælisskrivið, um byggingina í Maritugøtu, frá Eigarafelagnum seint í gjár, og eg havi ikki havt møguleika at seta meg inn í málið enn. Eg havi sent boð oman á býráðið, um at finna alla sakina fram, og so fari eg at kanna hvat er hent í hesum málinum. Áðrenn eg havi sæð sakina, fari eg ikki at gera nakra viðmerking. Um okkurt skeivt er farið fram í hesum málinum, so skal tað sjálvandi fram í ljósmálan. Men eg geri sum sagt onga viðmerking í málinum, fyrr enn eg havi sæð alt tilfarið, sigur Heðin Mortensen í stuttari viðmerking.

Michael Viderø er aftur í dag upptikin av fundarvirksemi, og er tískil ikki at hitta.

**eys**



Politijagstran í Suðurstreymoy:

# 20 ára gamal koyrdi 193 km/t

**Seinnapartin týsdagin vórðu tveir motorsúkkluførarar á 20 og 23 ár tiknir fyri sera høga ferð í Suðurstreymi. Annar koyrdi undan løgregluni og varð máldur at koyra 193 km/t, áðrenn løgreglan fangaði mannin við Mjáuvøtn í Kollfjarðadali**

FERÐ
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*Eftir at hava koyrt undan løgreglubilum bæði suðureftir og norðureftir og máldur at koyra 193 km/t varð 20 ára gamal motorsúkkluførari tikin av løgregluni í Kollfarðadali seinnapartin í gjár. Løgreglan leggur upp til, at maðurin missir koyrikortið*

Mynd: Jens Kristian Vang

Klokkan 16.45 í gjár handtók løgreglan í Havn ein motorsúkklukoyrara, sum varð máldur at koyra 160 km/t í Kaldbaksbotni, og 23 ára gamli førarin, sum hevði treytaðan dóm og harvið missir koyrikortið, steðgaði beinanvegin, tá løgreglan gav honum boð um hetta.

Men klokkan 17.50 var aftur galið, og hesaferð vóru førarar millum Kollafjørð og Havnina vitni til eitt ferðmikið drama, sum kundi verið beinleiðis filmað úr Hollywood.

### Fangaður við Mjáuvøtn

Ein 20 ára gamal maður varð máldur fyrst at koyra 140 km/t í Kaldbaksbotni, og tá løgreglan bað mannin steðga, byrjaði hann at koyra undan suður móti Havnini. Tveir løgreglubilar sperraðu beinanvegin vegin av við nýggju rundkoyringina í Hoyvík, og tá motorsúkkluførarin kom uppá bakkan móti rundkoyringini í Hoyvík og sá løgreglubilarnar, gjørdi hann ikki mætari enn at venda við og koyra norðureftir aftur við fullari ferð framvið løgreglubilinum, sum jagstraði unga mannin.

Gjøgnum radio sendi løgreglubilurin boð eftir einum øðrum løgreglubili, og so fóru tveir løgreglubilar við øgiligari ferð norðureftir í jagstranini eftir 20 ára gamla motorsúkkluføraranum, sum á veg norðureftir varð máldur at koyra 193 km/t.

Motorsúkkluførarin vendi móti Leynum, tá hann kom til rundkoyringina í Kollafirði, og við Mjáuvøtn millum Leynavatn og Statoil støðina í Kollfjarðadali eydnaðist løgreglan at vinna fram á og taka mannin, sum við sera høgari ferð hevði koyrt undan.

Av løgreglustøðini verður sagt, at førarin verður skuldsettur fyri ikki at akta løgregluna og koyra undan, umframt at hann eisini verður skuldsettur fyri at hava nátt eini ferð á 193 km/t. Maðurin hevur ikki dóm frammanundan, men løgreglan leggur upp til, at hann missir koyrikortið, og so er upp til dómaran at avgerða, hvør dómurin hjá 20 ára gamla manninum verður.

### Vandamikið rák

Løgreglumaðurin Tommy Brockie var mitt í rokanum í gjár, og hann sigur, at ein ávísur tendensur er at síggja við ferðmiklum motorsúkklum og ungum førarum.

– Tað koma fleiri og fleiri stórar maskinur til landið, og fleiri og fleiri ungir keyparar gera sær dælt av stóru og ferðmiklu motorsúkklunum, sigur Tommy Brockie. Hann sigur, at av politistøðini vænta teir fleiri líknandi tilburðir í summar, og tilbúgva teir seg nú til henda vaksandi trupulleika, sum liggur fyri framman.

# Óttast nýggja motorsúkklumentan

**– Higartil eru vit sloppin undan eini motorsúkklumentan í Føroyum, men hetta rák tykist nú venda, sigur Jón Kraagesten, leiðari á Ferðslutrygd. Sambært hagtølunum er motorsúkklan nógv vandamiklasta akfarið, og tí eru allar orsøkir at óttast sambært Jón Kraagesten**

FERÐ
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*– Higartil eru vit sloppin undan eini motorsúkklumentan í Føroyum, men hetta rák tykist nú venda, tí motorsúkklurnar gerast alt betri umtóktar, og tá motorsúkklan sambært hagtølunum er nógv vandamiklasta akfar, hava vit orsøk at óttast og fara undir fyribyrgjandi virksemi, sigur Jón Kraagesten av Ferðslutrygd*

Í kjalarvørrinum av tilburðinum í Suðurstreymoy í gjár hevur Ráðið Fyri Ferðslutrygd fingið nakað at hugsa um, og eru tey tilvitað um vaksandi motorsúkkluvirksemi í Føroyum. Jón Kraagesten av Ferðslutrygd sigur, at tey einki hava ímóti, at tilkomin fólk hava hetta sum ítriv við trygdini í hásæti, men hann óttast avleiðingarnar av hesum ráki.

### Motorsúkklan vandamiklast

– Fleiri og fleiri stórar motorsúkklur koma til landið, og meðan áhugabólkar hugna sær við hesum akførum, eru bivirkningarnir, at ungdómar keypa sær hesar motorsúkklur og koyra alt ov skjótt, so hetta gerst ein stórur vandi fyri bæði teir og onnur á vegunum í Føroyum, sigur Jón Kraagesten.

Hann heldur, at motorsúkklufjepparar hava dugað væl at marknaðarføra hetta akfar seinastu tíðina, men hann óttast saman við øðrum avleiðingarnar av hesum, tá tilburðir sum í gjár henda.

– Higartil eru vit sloppin undan eini motorsúkklumentan í Føroyum, men hetta rák tykist nú venda, tí motorsúkklurnar gerast alt betri umtóktar, og tá motorsúkklan sambært hagtølunum er nógv vandamiklasta akfar, hava vit orsøk at óttast og fara undir fyribyrgjandi virksemi, sigur Jón Kraagesten av Ferðslutrygd.

### 21 ára aldursmark

Jón Kraagesten vísir á tað, Ferðslutrygd fyrr hevur mælt politiska myndugleikanum at taka stig til.

– Vit halda, at meðan aldursmarki fyri knallertum kundi verið 15 ár, eigur aldursmarkið fyri stórum motorsúkklum at hækka frá 18 og til 21 ár, samstundis sum hægstamark fyri ferð framvegis skal vera 80 km/t, sigur Jón Kraagesten avgjørdur.

### Tingmenn ósamdir

Hetta evnið hevur verið viðgjørt í tinginum, og har hevur tingmaður Sambandsfloksins, Marjus Dam, mælt til at lækka avgjaldið á motorsúkklur við tí grundgeving, at nýggjar motorsúkklur eru tryggari enn gamlar.

Hinvegin vísir tingmaður Fólkafloksins, Andrias Petersen, á, at jú fleiri motorsúkklur vit hava, jú størri verður vandin fyri vanlukkum á vegunum, tá motorsúkklan sambært hagtølunum er so vandamikil. Hesir tingmenn umboða sambært Jón Kraagesten hvør sín vong á økinum, men enn er eingin avgerð tikin.